Skiftistí› vi› danska poppheimin

Seinastu dagarnir hava veri› buldraligir í politiska heiminum. Hol var› fríggjadagin sett á samrá›ingarnar millum donsku stjórnina og landsst‡ri› um framtí› stø›u Føroya. Er ta› eitt lív eftir ríkisfelagsskapin, spyrja nógvir føroyingar seg, samstundis sum ringur sjógvur er í sambandinum millum partarnar, sum samrá›st.

Danski statsministarin valdi eina har›a kós mótvegis føroyska loysingarkravinum, og ta› stó›st miki› rok av. Skiftistí›in, sum føroyingar fáa at gera seg sjálvstø›ugar búskaparliga, ver›ur tr‡ ella f‡ra ár, og ta› er langt frá teimum 15-20 árunum, sum landsst‡ri› hevur lagt upp til. Donsk blø› vilja ver›a vi›, at sáttmálauppskoti› hjá lands-st‡rinum kann hava vi› sær eina skiftistí› upp 63 ár.

Tá har›astu skjálvtarnir frá samrá›ingunum hava laga› seg, kemur fremsti danski poppbólkurin hendan vegin at undirhalda føroyingum. Og ta› ver›ur ivaleyst stuttligari at hoyra uppá enn monotoni› bo›skapurin hjá Nyrup. Steffen Brandt kann eisini ljó›a monotonur, men hann hevur humor og saman vi› bólki sínum, TV2, kunnu teir lata naka› av tí besta poppundirhaldinum, sum finst í danska kongaríkinum.

Um samrá›ingarnar millum donsku stjórnina og landsst‡ri› fer at hava vi› sær eitt sjálvstø›ugt føroyskt land, mugu føroyingar syrgja fyri at fáa eina langa og gó›a skiftistí› vi› danska poppheimin. Eini 63 ár er neyvan heilt av lei›. Ta› hev›i veri› spell at skula ver›a framførslur hjá TV2 og ø›rum donskum popp- og rockbólkum fyri uttan, men hetta kemur neyvan upp á tal, bara tí vit loysa frá Danmark.

TV2 dáma væl at arga fólk, serliga danir, men teir hava helst okkurt í skjáttuni vi› til Føroya, nú teir skulu standa frammanfyri føroyskum áhoyrarum. Tá Creamy vóru her í seinasta mána›, vóru ta› serliga børnini, sum fingu eitt stórt upplivilsi. Hesaferð eru ta› ungfólk og vaksin ungfólk, sum sleppa at halda seg fram at. Og vi› einum TV2 á pallinum, eigur ta› ikki enda gali›.

Send inn og vinn

3arin

letur eina fløgu um vikuna til teg, sum hevur besta innslagi› í Yngd.

Vinn eina fløgu

Nú gevur Yngd tær eisini møguleikan at vinna onkra av nýggjastu fløgunum, sum eru á marknaðinum. Fyri at lesararnir eisini skulu hava høvi at koma fram at, hava vit sjálvsagt rúm fyri einum brævkassa, har lesararnir fáa høvi til at siga sína hugsan um líkt og ólíkt.

Hevur tú eina yrking, eitt hjartasuff um okkurt, ella ein spurning til Yngd ella okkurt heilt annað, so er bara at finna pennin ella telduna fram, og skriva til okkum. Antin til Sosialurin postboks 76, 110 Tórshavn, merk brævbjálvan „Yngd“. Ella send okkum teldupost á yngd@sosialurin.fo

Hvørja viku verður so drigið lut ímillum innkomnu brøvini, og vinnarin fær eina spildurnýggja fløgu sendandi frá 3‘aranum í SMS. Fyri at eingin skal smæðast burtur, seta vit onga treyt um at innkomið tilfar verður undirskrivað við fullum navni. Navn og bústaður eiga tó verða upplýst til Yngd, soleiðis at vit vita, hvar ein møgulig fløga skal sendast.

Tí›indabla›i› Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn
Tlf: 311820
Fax: 314720
Teldupostur:
yngd@sosialurin.fo

Ábyrgdarbla›stjóri:
Jan Müller

Uppseting:
Karis Olsen

Yngd er ein partur av Sosialinum mikudag. Evstamark er á middegi fríggjadag

Les Yngd í Sosialinum hvønn mikudag

Miðnámsferðin hjá 98 b, annar partur

Allir vegir føra til Róm

Bár›ur Johannesen og Hannus Petersen

Fyri gó›um trimum vikum sí›ani skriva›u vit um fyrireikingar og fer›aætlan til námsfer›ina til Róm, og lova›u, at grei›a frá túrinum, tá i› vit komu heimaftur. Túrurin í Róm hevur veri› einastandandi gó›ur vi› nógvum stuttligum, spennandi og minnisríkum upplivilsum.

Fríggjamorgunin tann 25. februar møttust vit á farstø›ini vi› fullum kufferti, búki fullum av firvaldum og vónum um eina spennandi fer›, i› stó› fyri framman. Vit skuldu fyrst gista privat í Danmark í 2 dagar, á›renn fari› var› ví›ari vi› toki til Róm. Siglt var› fyrst vi› ferju til T‡sklands, og sí›ani var› fari› vi› toki gjøgnum alt Evropa. Tokfer›in vardi í slakar 24 tímar, so ein kundi hugsa› sær, at ta› gjørdist heldur strævi›, men so var ikki. Vit fingu sengur at sova á í tokinum, og ta› var helst ta›, i› veruliga gjørdi tokfer›ina gó›a, sjálvt um svøvnurin var lítil.

At koma til Róm var at kalla ein opinbering. Her er alt ø›rvísi enn ta›, i› føroyingar eru vanir vi›; mentaliteturin og atmosferan kundi ikki l‡sast vi› or›um — hetta má upplivast!

Tá i› vit komu á tokstø›ina í Róm og byrja›u at ganga til hotelli›, i› lá stutt ha›ani, fingu vit ta fyrstu hómingina av, hvussu frávíkjandi livihátturin hjá okkum er í mun til tann italska; her sipa vit til fer›sluna í Róm. Fyri ta› fyrsta koyrdu bilarnir bert í einari einvegis torvu, og fyri ta› næsta var eingin gonguteigur í eygsjón, so vit máttu bara leypa yvirum vegin og vóna ikki at ver›a yvirkoyrd. Og um onkur gekk spakuliga yvirum, hoyrdist beinanvegin floyt og róp frá teimum ótolnu bilførarunum. Fer›slan í Italia er sum Ricki Martin tekur til: ”La Vida Loca”- ta› svaka lívi›, men hetta sum so mangt anna› skal ein helst bara venja seg vi›.

Hotelli›, har i› vit bú›u, var ikki av teimum fínastu; men ta› n‡tist ta› ei heldur vera, av tí at hotelli› mest sum bert ver›ur n‡tt til at sova á. Hvør dagur hjá okkum gekk eftir fullum skema, har i› vit gingu runt í b‡num og hugdu, ikki bert eftir stásiligum og gomlum bygningum, i› Róm er kendur fyri, men eisini tí, i› nútí›armentanin í Róm hev›i at bjó›a uppá vi› kaféum og matstovum á hvørjum horni — hetta setti ein serstakan dám á.

Øki› rundanum hotelli› var ei heldur naka› at reypa av. Skøkjur sóust allasta›ni, og oftani fekk hotelli› vitjan av hesum gle›isgentum — Her er *ikki* talan um, at dreingirnir í okkara flokki lupu frammav og lótu seg freista; men a›rar heldur fínar handilsmenn, i› tóku sær av løttum.

Flott og fantastiskt!

Av tí at Róm var demokratiskt st‡rt, so máttu keisararnir gera sítt til at fólkini vóru nøgd vi› teirra virki sum stjórnarlei›arar. Tann rómverski keisarin mátti geva fólkinum ta›, i› fólki› vildi hava: panem et circensem (brey› og sjónleik). Av tí sama n‡ttu teir nógva orku til at byggja almenn marglætishús s.s. svimjihallir (thermae) og ringleikhús, i› vóru at síggja allasta›ni.

Her kunnu vit nevna ta› stóra amphiteatri› ella ringleikhúsi›, Kollosseum, i› rómverjar á sinni n‡ttu til undirhald. Á skránni var millum anna› svør›leikaraspøl og vei›is‡ningar. Lítil vón var um lív hjá krígsfangum, trælum og borgarum, sum anna›hvørt vór›u tvinga›ir ella valdu at gerast svør›leikarar (gladiatorar). Tá ráddi ta› um at hava teir bestu svør›leikararnar, og løgnari djórini vóru, tess vísari var sigurin. Fylgjurnar vóru líti› hugaligar hjá djórunum. Í fjór›u øld vór›u fleiri villinidjór avoydd, eitt nú áarrossi› í Nubia, leyvan í Mesopotamia og fílurin í Nor›urafrika. Sagt ver›ur, at tá i› ringleikhúsi› var› vígt, vór›u eftir bo›um frá keisaranum, næstan 5000 djór dripin bara í ein dag. Byggisni›i› hjá Kollosseum gongur runt í ein ring, og av hesum stavar navni amphiteatrum (Or›i› *amphi* er úr griskum og merkir “í ring”). Byggimeistarar á okkara døgum hava n‡tt hesi byggisni› sum fyrimynd, og t.d. eru ítróttarvallir ví›a um heim bygdir vi› amphiteatrum í huga.

Eisini vitja›u vit kenda útgrivna b‡in Pompei, i› liggur gott og væl 2 tímar vi› toki úr Róm. Hesin b‡ur var› fullkomiliga fjaldur í øsku, tá i› Vesuv fjalli› goysti í 79 e.kr.. Hendingin var› til alla lukku skriva› ni›ur av tænastumanni Traianus keisara, Plinius, i› sá hetta fyribrigdi› naka› fjart ha›ani. Plinius, l‡sur gjølla hesa ógvisligu hending í tveimum brøvum til vinmann sín, Tacitus.

Í dag er stórur partur av b‡num útgrivin, har i› stásiligir bygningar og fornleivdir í hópatali standa at kalla júst sum um ta› mundi›, ólukkan hendi. At ganga runt í b‡num kendist sum um ein var afturi í árinum 79 e.kr.

Barokkin

Í mi›øldini hev›i tann katólska kirkjan, t.e. pávamaktin, stórt vald. Uml. 400 kirkjur og kleystur vór›u bygd um hetta mundi›. Hesar kirkjur eru so stórar og ógvusligar, at ein kennir seg sum eina meyru, tá i› ein stendur og sko›ar alt ta› stásiliga pr‡›i›, i› har er at síggja. Orsøkin til, at alt er so stórt, er ikki tilvildarlig. Bo›skapurin í øllum hesum er, at vit menniskju skula kenna okkum lítil og einkisigandi. Alt hetta virkar sum ein stórur maktfaktorur, i› kúgar fólki› - ein jantelóg um tú vilt.

Róm í dag

Tá i› tú gekk runt í b‡num og fekk sólina í eyguni, var ta› eisini ymiskt anna›, i› tú fekk í eyguni:) Tá i› ein gongur runt allan dagin og hungrar eftir vitan, so er ta› eisini freistandi at seta seg ni›ur at sløkkja tostan. Hugnaligt, gott og deiligt var at sita á kafé og fáa sær eitt glas av víni ella sjey. Italiumonnum dáma væl at sita á kafé og bróta frá gerandisstrí›num inn í millum, og hetta tók okkum ikki langa tí› at venja okkum vi›.

Í fyrru greinini skriva›u vit, at ætlanin var eisini at fara til fótbóltsdyst í Champions League, og so var› gjørt. Dysturin var ímillum italska li›i› Lazio og Ni›urlendska li›i› Feyenord. Stuttligt var at sita ímillum 30.000 fólk, i› øll sótu og róptu og sungu. Hetta var eitt satt upplivilsi, og sjálvt um fitt av hooligans vóru at síggja, so gjørdu teir til alla lukku líti› og einki um seg.

Eftir at hava veri› í Róm í sjey dagar, vóru vit øll eitt fer›aminni ríkari, og sjálvt um fer›in ongantí› var anna› enn gó›, so vóru vit gla› at sleppa heimaftur til okkara at samanbera slowmotion gerandisdagin í Føroyum. —
Úti er gott, men heima er best.